# Bilar

Nr. 99 • hósdagur • 27. mai 2004 • 78. árg.



*Alfa Romeo GT - ein nýggjur coupé við sínum egna smarta designi*

# Nýggir bilar vísa sítt sanna »andlit«

**Fleiri av nýggju bilunum sum eru á veg á marknaðin, eru merktir av at bildesignararnir veruliga tora at royna nakað nýtt við spennandi og avbjóðandi designum. Sum t.d. Audi, Peugeot og Alfa Romeo**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað er altíð nakað av eini satsing, tá bildesignarar bróta burtur úr nýggjum og geva bilunum "persónligheit", so teir veruliga síggjast aftur í gøtumyndini og ikki líkjast øllum øðrum bilum. Designið kann avgera lagnuna hjá einum bilmodelli, alt eftir hvussu bilurin verður móttikin av kundunum.

Sum til dømis nú vit síggja at Audi fáa trapezformað kølaragittar, sum klæðir bilunum sera væl, og teir síggja annarleiðis og elegantir út. Tað er dugnaligi designstjórin hjá Audi, Walter da Silva, sum teknar bilarnar. Áðrenn hann kom til Audi, var hann designstjóri hjá Alfa Romeo, sum eisini hava sítt egna smarta design.

Peugeot eru eisini við at geva sínum bilum "persónligheit", við tað at bilarnir nú fáa stórt Peugeot-logo við stórum opnum kølaragittari í kúfangaranum niðan fyri forlyktirnar. Búmerkið hjá Peugeot er ein leyva, og onkur nevnir kølaragittarið "løvens hule".

Peugeot 407 verður fyrsti bilur við hesum nýggja designinum, og hann verður als ikki anonymur í gøtumyndini. Tað er italski bildesignarin Pininfarina, sum eisini teknar italsku Ferrari sportvognarnar, ið hevur designað Peugeot 407. Tað sæst aftur í avbera vøkru og smartu linjunum.




*Audi A6 við trapez-formaðum kølaragittari sum klæðir bilunum sera væl. Bilurin sær annarleiðis og elegantur út*




*A8 var tann fyrsti Audi við nýggja designinum framman*

*Mynd:Álvur Haraldsen*



*Peugeot 407 við stórum Peugeot-logo og stórum opnum kølaragittari í kúfangaranum. Búmerkið hjá Peugeot er ein leyva, og onkur nevnir kølaragittarið "løvens hule"*

*Mynd.: Álvur Haraldsen*



# Nýggjur brandbilur til Kollafjarðar

**Eftir aðalfundin hjá Landsfelag Sløkkiliðsmanna seinasta leygardag vórðu fleiri brandbilar sýndir fram. Í dag handaði Kartni Jacobsen, brandmeistari í Tórshavnar Kommunu, ein nýggjan brandbil til Sløkkiliðið í Kollafirði**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Talan er um ein Mercedes-Benz Atego 1325F, sum er uppbygdur hjá Ringe Karrosseri A/S í Danmark. Bilurin hevur 300 hk motor og er uppbygdur úr glasfibur og aluminium.

Pláss er til 6 fólk í bilinum við haldarum til roykkavaraútgerð.

Tangin tekur 2000 litrar, og pumpan gevur 2400 litrar við 10 bar og 250 litrar um minuttin við einum trýsti upp á 40 bar. Tvær 60 m langar hátrýstslangur eru í bilinum.

Landsfelag Sløkkiliðsmanna hevði leygardagin 22. mai 2004 aðalfund í Havn, og eftir aðalfundin vístu Kvívíkar, Vestmanna, Miðvágs/Sandavágs, Kollafjarðar og Tórshavnar Sløkkilið fram nýggjar sløkkiliðsbilar: Síðani bjóðaði danska fyritøkan Ringe Karrosseri A/S ein bita, fyritøkan fæst burturav við av byggja sløkkiliðsbilar.

Bilurin sum Tórshavnar Sløkkilið fekk kostaði 1,2 mill. krónur.



*Eftir aðalfundin hjá Landsfelag Sløkkiliðsmanna seinasta leygardag vístu Kvívíkar, Vestmanna, Miðvágs/Sandavágs, Kollafjarðar og Tórshavnar Sløkkilið fram nýggjar sløkkiliðsbilar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Hesin Mercedes-Benz Atego 1325F hjá Tórshavnar Sløkkiliði í Kollafirði hevur 300 hk motor og er bygdur upp hjá Ringe Karrosseri A/S*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Porsche 911 í tveimum nýggjum útgávum

**Porsche 911 hevur verið á marknaðinum í meira enn 40 ár. Nú eru tvær nýggjar útgávur komnar á marknaðin. Porsche 911 Carrera og 911 Carrera S. Báðir eru teir tveir super sportsbilar við eini toppferð upp á næstan 300 km/t**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Porsche 911 Carrera S*

Porsche 911 hevur meira enn 40 ár á baki, og hetta er fyrstu ferð síðan 1977, at Porsche koma á marknaðin við tveimum nýggjum 911 samstundis. Talan er um Porsche 911 Carrera við 3,6 litur boxermotori við 325 hk og 911 Carrera S við 3,8 litur boxermotori við 355 hk. Teir koyra frá 0-100 km/t upp á ávikavist 4,8 og 5,0 sek og toppferðin er 285 og 293 km/t.

Porsche 911 Carrera hevur 18" hjól og brúkar dekkstøddina: 235/40ZR-18 framman og 265/40ZR-18 aftan. Carrera S hevur 19" hjól og brúkar dekkstøddina 235/35ZR-19 framman og 295/30ZR-19 aftan.

Báðir bilarnir eru sera framkomnir við einum heilt nýggja 6-tirns girkassa, aktivari fjaðraskipan og koyrieginleikum á sera høgum støði.

Í Danmark kostar 911 Carrera 1,6 mill. krónur og 911 Carrera S 1,8 mill. krónur.



*Soleiðis sær ein Porsche 911 Carrera út innan. Bilførarin má sita væl í einum bili, sum kann koyra næstan 300 km/t*

## Saab 9-3 tjóvarítryggur



Saab 9-3 er einasti bilur sum er góðkendur av "Svensk brand & sikkerhedscertificering " fyri trygt lásasystem. Teknikarar hjá Saab Automobile í Trollhättan hava gjørt ein bil, ið er ómøguligur at stjala

*Kelda: Tíðindaskriv frá Saab*

## Framleiðslan av Octavia økjast



Sum úrslit av stóra áhuganum fyri nýggja Skoda Octavia, er ætlanin hjá Skoda Auto at økja upprunaliga framleiðslukapasitetin, sum er upp á 40.000 bilar árliga. Í løtuni verður arbeitt við eini ætlan um, hvussu skjótt framleiðslan kann økjast

*Kelda: www.semler.dk*

## Mazda3 diesel



Mazda3 er komin á danska marknaðin við einum nýggjum kvikum 1,6 litur commonrail turbodiesel motori við 109 hk. Toppferðin er 185 km/t, og hann koyrir frá 0-100 km/t upp á 11,3 sek

*Kelda: Mazda Motor Danmark*